DAGSINS MEINING

Fri›arvir›isløn og mannarættindi

Sunnudagin var altjó›a mannarættindadagur og sama dag fekk su›urkoreanski forsetin Kim Dae Jung altjó›a fri›arvir›isløn Nobels. Neyvan kundi vali› ver›ur rættari, tá hugsa› ver›ur um fortí›ina hjá Kim Dae Jung og ta› hann hevur megna› í starvinum sum forseti Su›urkorea, nevniliga at hava sett hol á fri›ardialogin vi› grannan Nor›urkorea. Kim Dae Jung er asiatiska svari› uppá europeiska Havel og afrikanska Mandela. Eins og teir sótu fongsla›ir og máttu lí›a nógv fyri ta› teir trú›u uppá: frælsi og rættvísi og mannarættindi fyri allar borgarar. Og eins og teir bleiv eisini hann kosin forseti í sínum egna landi. Eftir at hava veri› fongsla›ur, siti› í húsavar›haldi og entá dømdur til dey›a var› Kim Dae Jung valdur til landsins forseta. Í dag hevur hann fingi› Nobelvir›islønina, nettupp á sama hátt sum Mandela og Havel fingu hana fyri strí› teirra móti ávikavist apartheid og totaliterari kommunismu. Hann hevur fingi› í lag dialog vi› Nor›urkorea, naka›, sum eingin undan honum seinastu 50 árini hevur megna›.

Onkur heldur ta› kanska er ikki rætt at tengja hesa vir›islønina saman vi› tí, sum í løtuni fer fram í USA. Men vit vilja kortini gera ta›. Tí í bá›um førum er talan um mannarættindi. Um somu tí› sum su›urkoreanski forsetin fær fri›arvir›islønina fyri sítt sló›brótandi arbei›i til frama fyri mannarættindum ver›ur guvernørurin í Texas, staturin, sum hevur met í amerikanskari søgu fyri at taka fangar av døgum, møguliga forseti í USA.

Felagsskapurin Amnesty hevur sum virkisøki at strí›ast fyri mannarættindum um allan heim. Solei›is hevur felagsskapurin veri› vi› til at hjálpa og stu›la Kim Dae Jung, tá hann stó› til at ver›a avrætta›ur fyri strí› sítt fyri demokratii. Sami felagsskapurin hevur brúkt nógv av síni orku uppá at fáa USA til at avtaka dey›arevsingina, sum ver›ur mett av grovastu mannarættindabrotum í dagsins heimi. George Bush, yngri, sum stendur til at gerast forseti í USA, ver›ur tann forseti í USA, sum í síni guvernørtí› hevur givi› bo› um at taka flestu fangar av døgum, og sum hevur nokta› at geva dey›adømdum gri›, eisini teimum, sum ivi var um, høvdu framt naka› revsivert. Eisini evnaveik, ófullfør og ungfólk hava veri› tikin av døgum. Bró›urin er guvernørur í Florida, sum eisini hevur met í avrættingum. Vi› at lata valdi› til ein Buschara eru útlitini fyri avtøku av dey›arevsing døpur. Og uppaftur verri er ta›, at Buch komandi f‡ra árini skal til at velja tríggjar n‡ggjar hægstarættardómarar, og hetta merkir, at vit fara at síggja ein uppaftur meira konservativan hægstarætt í "Gods own country" og harvi› eisini eitt framhald av dey›arevsingini og a›rari inhumari lóggávu, sum serstakaliga høgravendir politikarar og dómarar eru borgan fyri.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Umsitingarlei›ari hjá Løgmansskrivstovuni

Petur Simonsenettur er settur sum umsitingarlei›ari hjá Løgmansskrivstovuni. Umsitingardeildin er ein tænastudeild hjá hinum deildunum á skrivstovuni vi› ábyrgd fyri m. a. starvsfólka- og fíggjarvi›urskiftum

Mynd: Jens Kristian Vang

Petur S. Simonsen, sum í 13 ár hevur veri› lei›ari á Landsmi›stø›ini fyri Undirvísingarambo›, fer komandi ár í anna› starv

Nøvn
Jákup Mørk

Sí›ani Landsmi›stø›in fyri Undirvísingarambo› var› sett á stovn í 1987, hevur lei›arin á stovinum iti› Petur S. Simonsen.

Innan stutta tí› fer Petur tó í anna› starv. Hann er nú settur sum umsitingarlei›ari hjá Løgmansskrivstovuni. Umsitingardeildin er ein tænastudeild hjá hinum deildunum á skrivstovuni, vi› ábyrgd fyri millum anna› starvsfólka- og fíggjarvi›urskiftum.

Ein var›i at fara frá

Spurdur um ta› nú er eitt lívsverk, sum hann fer frá, svarar Petur, at ta› er kanska at gera í so nógv.

- Ta› er tó einki at ivast í, at hetta er ein t‡›andi var›i í starvstí› mínari, heldur hann.

- Tá eg var› settur í starv her fyri 13 árum sí›ani, kom eg so at siga til eitt skrivarabor› og ein stól, og sí›andi havi eg veri› vi› til at bygt stovnin upp. Í dag haldi eg meg kunna siga, at talan er um ein stovn, sum hevur fingi› fótafesti í føroyskum undirvísingarverkinum, so ta› er sjálvsagt, at hetta hevur naka› at siga fyri meg.

13 ár sum lærari

Petur er annars fuglfir›ingur, og er 53 ára gamal.

Eftir at hava loki› studentsprógv í Danmark, var› hann í 1974 útbúgvin lærari.

Sí›ani starva›ist tvey ár á Venjingarskúlanum í Havn, á›renn lei›in gekk til heimbygdina, har hann árini 1976-87 virka›i sum lærari. Í 1987 var› hann so settur sum lei›ari á n‡ggja stovninum.

Me›an hann virka›i sum lærari, var hann eisini aktivur innan undirvísingaverki› í a›rar mátar.

Virkin innan ítrótt

Umframt at hava virka innan undirvísingarverki›, hevur Petur eisini veri› sera virkin innan føroyska ítróttaheimin.

Sum aktivur var ta› einamest hondbóltin, sum hann fekst vi›, men eisinu flog- og fótbóltur hava sta›i› ovarliga á skránni. Ta› er tó kanska serliga eftir hetta, at navn hansara í størri mun hevur veri› at hoyrt í ítróttahøpi.

Sum flogbólts- og serliga fótbóltsvenjari hevur hann í mong ár veri› virkin innan fleiri ymisk ítróttafeløg, og enn hevur hann avgjørt ikki slept endanum í so máta. Hetta ári› hevur hann sostatt virka› sum ungdómsvenjari hjá EB/Streymi. Hann hevur annars veri› venjari hjá millum ø›rum B36, HB, KÍ, ÍF og B68.

Petur er giftur Sonju, og saman hava tey børnini, Marthu, Paulu, Sigrun, Jens Sigur› og Leiv.

Eftir ætlan tekur hann vi› starvinum sum umsitingarlei›ari á Løgmansskrivstovuni 1. apríl.

Tøkk

Hjartaliga takk øll tit, sum gjørdu gullbrúdleypsdagin 07. oktober so hugnaligan. Ein serlig tøkk til børn og barnabørn fyri hjálpina. Gle›ilig jól og gott n‡ggjár øll somul

Petrea og Poli Jacobsen, Mi›vágur

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á 80 ára degnum tann 30.10.2000

Mina Petersen

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.